# Hygg inneftir og síggj úteftir

**Tað ræður um at hyggja inn í seg sjálvan, og samstundis síggja heimin rundan um teg, um nøkur nytta skal fáast burtur úr tær, sigur formaðurin í altjóða Bláa Krossi, norðmaðurin Geir Gundersen, sum helt fyrilestur um rúsevni í Norðurlandahúsinum seinasta fríggjadag**

RÁÐSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Tú skalt bæði kunna hyggja inn í teg sjálvan og síggja heimin rundan um teg samstundis, um tú skal vera til nakra nyttu fyri tíni medmenniskju, sum hava hjálp fyri neyðini, sigur Geir Gundersen, formaður í altjóða Bláa Krossi*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Tú mást finna teg sjálvan, men síggja og kenna umheimin, um tú skalt gera tær nakrar vónir um at kunna brúkast sum hjálp hjá øðrum, sum hava hjálp fyri neyðini, sigur Geir Gundersen, sum er formaður fyri altjóða Bláa Krossi. Hann helt fyrilestur á ráðstevnu hjá Bláa Krossi í Føroyum, sum hildin varð í samband við, at Blái Krossur hevur hundrað ár á baki í Føroyum.

Geir Gundersen tosaði á ráðstevnuni um viðurskifti millum misnýtara og viðgerðarar. Um hættir fyri viðgerð og um hvussu til ber at fáa orð á ein misnýtara.

## Lat upp

Tað er av størsta týdningi, segði hann, at tann, sum skal hjálpa einum persóni burtur úr misnýtslu, er atkomiligur hjá tí, sum hjálpast skal. Vegurin hjá tí, sum skal hjálpa, er altíð vegurin um seg sjálvan, segði Geir Gundersen, formaður í altjóða Bláa Krossi.

Tað má vera soleiðis, at misnýtarin kann koma til tann, sum skal hjálpa honum. Og fyri at hann kann tað, skal hjálparin vita, hvussu hann kann lova ti, sum hjálpina skal hava, framat. Hjálparin má vera greiður í síni søk og sinum útmeldingum, um nøkur nytta skal fáast burtur úr honum, segði Geir Gundersen.

Tað skiltist á innlegginum hjá Geir Gundersen, at »etableraða systemið« var ikki júst tað, hann hevði mest álit á. Honum dámdi betri, at hjálparin var, ella hevði verið, á sama støði sum misnýtarin, sum viðgerast skuldi.

Hann greiddi frá einum, sum hevði verið til viðgerðar, sum segði frá, at tey, hann fekk mest nyttu burturúr, vóru hansara medpatientar. Síðan kom vaskikonan, og at enda vóru tað tey sonevndu klóku í ovara enda.

Tað er neyðugt hjá okkum øllum, bæði misnýtara og viðgerðara, at vit hyggja at egnum lívi og skilja, hvat vit vilja við tí, segði Geir Gundersen.

Vit mugu skifta fordómar og sjálvgjørdar gudamyndir út við tann einfalda spurningin til okkum sjálv: »Hvør ert tú?«

Hesin spurningur, ið er lættur at seta, men ofta ringur at svara. Fyrr enn vit vita og duga at brúka tað, kunnu vit illa ráðgeva øðrum um, hvussu tey skulu vera, sigur hann.

## Nýggjur í gomlum felagsskapi

Geir Gundersen er fyrsti formaðurin í altjóða Bláa Krossi, sum ikki er úr Sveits.

Tann søgan hevur sín uppruna í, at Blái Krossur, eins og Reyði Krossur, er felagskapur, sum stovnaður er í Sveits. Og higar til dags hava tey hildið uppá, at formaðurin eisini hevur verið haðani.

Men Geir Gundersen er ikki nakar veteranur í hesum arbeiðinum. Hann er ikki fyrr enn fyri umleið trimum árum síðan komin upp í Bláa Kross yvirhøvur, greiddi hann frá á ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum. Og longu er hann altjóða formaður.

Hann nam eitt sindur við søguna hjá Bláa Krossi, sum í altjóða høpi hevur 127 ár á baki.

Í Føroyum hevur Blái Krossur verið í hundrað ár. Tað er longri, enn felagsskapurin hevur verið í Noreg, vísti hann á og kallaði tí føroyska felagsskapin fyri stórabeiggja.

Blái Krossur byggir á kristið grundarlag. Men altjóða formaðurin, sum er prestur, legði dent á, at endamálið hjá felagsskapinum í dag var ikki at prædika nakran boðskap um ein fráhaldsfelagsskap, men heldur at virka sum ein hjálparfelagsskapur, sum tók sær av fólki, ið eru komin illa fyri. Men sum tó so sanniliga eisini hevði ein fyribyrgjandi boðskap at bera.

# Náddu endamálinum

**Endamálið við ráðstevnuni hjá Bláa Krossi var at finna út av, hvussu grannar okkara gera, sigur Jaspur Langgaard, aðalskrivari í Bláa Krossi í Føroyum**

RÁÐSTEVNA
*Edvard Joensen*



*Jaspur Langgaard, aðalskrivari hjá Bláa Krossi, er væl nøgdur við rúsevna ráðstevnuna, sum hildin varð í Norðurlandahúsinum fríggjadagin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Rúsevna ráðstevnan, sum Blái Krossur skipaði fyri í Norðurlandahúinum seinasta fríggjadag, eydnaðist væl, sigur aðalskrivarin í Bláa Krossi, Jaspur Langgaard.

– Endamálið var at kanna og kunna um, hvussu arbeitt verður við rúsevnum og teimum trupulleikum, sum av tí standast, í okkara grannalondum. Málbólkurin var fólk, sum profesisonelt arbeiðið við hesum evninum, og eg meti, at vit náddu málinum, sigur hann.

Fyrireikingarbólkurin, sum Blái Krossur hevði sett at fyrireika 100 ára haldið hjá felagsskapinum, hevði fingið fyrlestrahaldarar uttaneftir til tiltakið. Eisini Karin Kjølbro, leiðari á Kriminalforsorgini í Føroyum var millum fyrilestrahaldararnar.

Talan var ymsar serfrøðingar, sum hildu fyrilestrar, og síðan var orðaskifti um tað, ið borið varð fram. Jaspur Langgaard sigur, at kjakið var lívligt og gott.

Ofta fara vit eftir fremmandum fyrilestrahaldrum og fáa at vita, hvussu vorðið er, og hvat gjørt verður aðrastaðni. Hesaferð var eisini ein føroyskur fyrilestrahaldari, sum var Karin Kjølbro. Og hennara fyrilestur gav ivaleyst fleiri nakað at hugsa um, sigur Jaspur Langgaard. Tí hon vísti á, at tað stendur ikki heilt so væl til í Føroyum við rúsevnum, sum kanska fleiri ganga og ímynda sær og ugga seg við.

Hóast Blái Krossur helt 100 ára hald, var hetta fyrsta ráðstevna av slíkum slag, sum felagsskapurin skipar fyri. Men aðalskrivarin væntar ikki, at hetta verður tann einasta. So mikið áhugaverda helt hann hana vera.

– Men tað verður ikki í morgin ella ovurmorgin, at vit skipa fyri eini nýggjari, sigur hann.



# Karsten rendi á Olaf

**Løgtinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum, Karsten Hansen, rendi fríggjadagin við bili sínum inn í síðuna á bilinum hjá fyrrverandi landsstýris- og løgtingsmanninum hjá Fólkaflokkinum, Olaf Olsen. Fyrrverandi sýslumaðurin í Klaksvík valdi ikki at melda óhappið**

BILÓHAPP
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*



*Her er so bilurin hjá Olafi Olsen, sum Karsten Hansen rendi á fríggjadagin*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

Ikki kann sigast annað, enn at Tjóðveldisflokkurin rør ein tungan sjógv í løtuni. Seinasta mánaðin hava tveir limir í flokkinum verið í almennum stríði, og mánakvøldið kom undan kavi, at tinglimurin hjá Tjóðveldisflokkinum í Norðoyggjum, Karsten Hansen, breyt ferðslulógina fríggjadagin, tá hann ikki helt víkiskylduna.

Fríggjamorgunin stutt fyri klokkan 10 er Karsten Hansen á veg í bili sínum út á Sjómansskúlan og koyrir oman eftir Sverrisgøtu. Fyrrverandi sýslu- og løgreglumaðurin í Klaksvík heldur ikki víkiskylduna, og rennir á bilin hjá fyrrverandi landsstýris- og løgtingsmanninum hjá Fólkaflokkinum, Olaf Olsen, ið er á veg omaneftir Tórsgøtu.

Karsten Hansen tekur óhappið á sínar herðar, og fortelur Olafi Olsen, at hann skal boða tryggingini frá tilburðinum. Olaf Olsen sigur við Sosialin, at hann tók undir við løgtingsliminum, tí sjálvur var hann ósekur í óhappinum.

Seinni fríggjadagin tosa Olaf og Karsten saman aftur í telefon, og avtalað varð, at fyrrverandi sýslumaðurin í Klaksvík skuldi boðaði tryggingini frá.

Í Degi og viku mánakvøldið kom fram, at Karsten Hansen valdi ikki at boða løgregluni frá tilburðinum, tí hann metti ikki óhappið var av slíkum slagi, at tað gjørdist neyðugt.

Í Degi og viku ásannaði Karsten Hansen kortini, at hann átti feilin í tilburðinum, og at hann tí átti at havt meldað óhappið til løgregluna. Nú óhappið var blivið alment, ætlaði Karsten Hansen at melda tilburðin.

## Onga viðmerking

Formaður Tjóðveldisflokssins, Høgni Hoydal, hevur onga viðmerking til óhappið hjá Karsten Hansen í løtuni. Hann greiðir frá, at hann varð kunnaður um málið klokkan 17 mánadagin, men at málið fyribils er eitt mál millum Karsten Hansen og løgregluna.

Vit hava allan fyrrapartin týsdagin roynt at hitt Karsten Hansen á máli, men uttan úrslit.

Tryggingarfeløgini:

# Krevja ikki løgreglurapport

**– Ert tú atvoldin til eitt ferðsluóhapp, har størri materiellur skaði ella skaði á menniskju er hendur, skal løgreglan fráboðast. Men tað eru teir báðir partarnir í ferðsluóhappinum, sum í fyrstu atløgu gera av, hvørt materielli skaðin er stórur ella ikki, sigur stjórin í Trygd, Christian C. Nielsen**

TREYTALEYS VÍKISKYLDA
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*



*Christian C. Nielsen, stjóri í Trygd sigur, at tað ikki er eitt krav frá tryggingini, at løgreglan skal verða fráboðað um óhappið, fyri at tryggingin skal taka við. Heldur ikki, tá koyrt verður um hávatenn, og treytaleysa víkiskyldan harvið verður brotin. – Vit melda so ongan, staðfestir hann.*
*Savnsmynd*

Stjórin í tryggingarfelagnum Trygd, sum er annað av føroysku tryggingarfeløgunum, sigur, at teirra politikkur er sera greiður, tá tað kemur til ferðsluóhapp.

– Vit forlanga ikki at politiið skal verða uppi í leikinum, uttan so, at fólkaskaði er hendur. Onkuntíð seta vit okkum í samband við løgregluna, um so er, at óhappið hevur elvt til stóran materiellan skaða. Men um eingin politirapport er skrivað, so gera vit ikki meira við tað, sigur Christian C. Nielsen, stjóri.

– Tað fyrsta, sum vit krevja av okkara tryggingartakarum er, at teir sjálvir meta skaðan, sum er hendur. Er stórur skaði hendur á bil ella ogn hjá øðrum, hava vit sum reglu, at løgreglan skal fráboðast. Men tað er sum sagt upp til einkulta tryggingartakaran at meta um. Er fólkaskaði hendur, so skal løgreglan uppí leikin, greiðir Christian C. Nielsen frá.

Eftir at tryggingin hevur fingið skaðafráboðanina, verður ein sýnsmaður sendur út frá tryggingini at sýna skaðan. Um hesin metir skaðan vera stóran, setir hann seg í samband við løgregluna, fyri at vita um rapport er skrivað í málinum.

## Fleiri sleppa undan

Stjórin í tryggingarfelagnum Trygd sigur, at tað eftirhondini eru alsamt færri skaðar, sum verða fráboðaðir løgregluni.

– Fyrr vóru so gott sum øll óhapp meldað til løgregluna, men vit síggja nú oftari og oftari, at løgreglan ikki veit nakað um skaðarnar, sum vit fáa fráboðanir um, staðfestir stjórin í Trygd.

Tað vil siga, at tað als ikki eru øll ferðsluóhapp, ið verða meldað til løgregluna. Hinvegin er alsamt vanligari, at partarnir í óhappinum finna eina innanhýsis semju.

Christian C. Nielsen sigur víðari, at um eingin politirapport er skrivað, so ger tryggingin ikki meira við málið.

– Vit lata løgregluna um at gera teirra arbeiði, tað leggja vit okkum ikki útí. Fáa vit eina fráboðan, sum løgreglan ikki veit nakað um, so fara vit ikki at melda tryggingartakaran. Tað er ikki okkara arbeiði, sigur Christian C. Nielsen, og leggur afturat, at tað eisini er galdandi, um tryggingartakarin hevur koyrt um hávatenn, og harvið hevur brotið treytaleysu víkiskyldina.

– Vit spyrja um politirapport er skrivað. Er hon tað, verður hon tikin til eftirtektar. Er hon ikki tað, verður sakin avgreidd á vanligan hátt allíkavæl, greiðir hann frá.

Fyri at koyra um hávatenn og harvið bróta treytaleysu víkiskylduna, eigur tú at fáa treytaða frádøming av koyrikortinum, umframt, at tú skalt upp til nýggja roynd í bæði koyring og teori.

Men finna partarnir báðir eina semju, soleiðis, at løgreglan ikki verður fráboðað, er gjørligt at sleppa undan at taka koyrikortið av nýggjum.

Tað er nevniliga ikki ein treyt frá tryggingini, at løgreglan skal vita um óhappið, fyri at tryggingin skal taka við.